Almannamálaráðið

Løgtingið

Dagfesting:	22. februar 2021
Mál nr.:	21/02031-2
Málsviðgjørt:	HP
Eftirkannað:	18. februar 2021

Uppskot til

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um dagpening vegna sjúku v.m.
(Leingjan av gildistíð til 1. februar 2022)

§ 1

Í løgtingslóg nr. 143 frá 9. oktober 2020 um broyting í løgtingslóg um dagpening vegna sjúku v.m., verður í § 2, stk. 1 “1. mars 2021” broytt til: “1. februar 2022”.

§ 2

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

1.1. Orsakir til uppskotið

Løgtingslóg nr. 143 frá 9. oktober 2020 er sett at fara úr gildi tann 1. mars 2021. Enn er tað soleiðis, at einstakir tilburðir av COVID-19 stinga seg upp, og sannlíkt er, at COVID-19 ikki fer at hasa av enn. Fyri at minka um avleiðingarnar fyri borgarar og vinnulív og fyri at fyribyrgja, at persónar fara at bróta sóttarhaldið, er neyðugt at leingja gildistíðina av lógini.

1.2. Galdandi lóggáva

Løgtingslóg nr. 143 frá 9. oktober 2020 hevur hesar heimildir:

- Dagpeningur verður veittur til persónar, sum vanliga eru fevndir av løgtingslóg um dagpening vegna sjúku, sum eru settir í sóttarhald (t.v.s. at sóttarhald verður javnsett við sjúku). Persónar, sum vanliga eru fevndir av løgtingslóg um dagpening vegna sjúku, sum verða smittaðir við COVID-19, eru frammanundan fevndir av lógini.

- Starvsfólk á privata arbeiðsmarknaðinum, sum hava rætt til løn undir sjúku, verða eisini fevnd av dagpengalógini, um tey verða smittað við COVID-19 ella verða sett í sóttarhald. Í praksis verður tað skipað soleiðis, at arbeiðsgevarin rindar løn til tann sjúka og rindar løn til tann, sum er í sóttarhaldi, og arbeiðsgevarin fær so endurgoldið lønarútreiðsluna frá Almannaverkinum (tó í mesta lagi 80 % av løn sambært sáttmála millum Føroya Arbeiðsgevarafelag og Føroya Arbeiðarafelag).

- Fólkapensjonistar, sum arbeiða, fáa eisini rætt til dagpening vegna sjúku, um tey verða smittað við COVID-19 ella verða sett í sóttarhald. Dagpeningur til fólkapensjonist kann tó í mesta lagi vera 500 kr. um dagin, meðan onnur í mesta lagi kunnu fáa 960 kr. íroknað frítíðarløn.

- Tá talan er um COVID-19 smittu ella sóttarhald, sleppur arbeiðsgevarin undan at rinda fyri 1. og 2. fráverudag (undir øðrum vanligum umstøðum skal arbeiðsgevarin altíð rinda í 1. og 2. fráverudag).

- Treytirnar viðv. sjálvbodnari trygging (sbrt. løgtingslóg um dagpening vegna sjúku v.m.) til sjálvstøðug vinnurekandi og stjórar í egnum felagi verða linkaðar í málum, sum viðvíkja COVID-19. Umsókn kann latast inn, og dagpeningur útgjaldast beinanvegin – eisini í teimum førum, at umsøkjari longu er smittaður ella settur í sóttarhald (vanliga tekur rættur til útgjald við 4 vikur eftir, at umsókn er latin inn, og umsøkjari skal ikki vera sjúkur, tá hann søkir).

- Í málum um COVID-19 er ikki neyðugt við læknaváttan. Ein váttan frá arbeiðsgevara verður javnsett við læknaváttan.

Lógin fer úr gildi tann 1. mars 2021.

1.3. Endamálið við uppskotinum

Endamálið við lógaruppskotinum er at heimila at veita fíggjarligt endurgjald til tey, sum verða rakt av COVID-19 frá 1. mars 2021. Við uppskotinum verður gildistíðin longd frá 1. mars 2021

til 1. februar 2022, soleiðis at tíðarskeiðið við nógvum ferðafólkaflutningi, er farið aftur um bak, áðrenn lógin fer úr gildi.

1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum

Við uppskotinum verður sólseturásetingin broytt soleiðis, at lógin fer úr gildi tann 1. februar 2022 í staðin fyri tann 1. mars 2021.

1.5. Ummæli og ummælisskjal

Fyri at fyribyrgja at borgarar verða fyri inntøkumissi er neyðugt at broyta lógina alt fyri eitt. Talan er ikki um innihaldsligar broytingar í lóggávuni, og tí hevur uppskotið ikki verið til ummælis.

Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Uppskotið hevur fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur. Fyri landið er talan um beinleiðis útreiðslur á § 12 almannamál. Uppskotið tryggjar, at skattainntøkurnar hjá landi og kommunum í ein ávísan mun verða varðveittar, hóast virksemið í samfelagnum minkar.

Tað ber ikki til at meta um, hvussu nógvir persónar fara at verða smittaðir við COVID-19 ella fara í sóttarhald, og tí er heldur ikki gjørligt at meta neyvt um útreiðslurnar. Hægsti dagpengagasatsur er 960 kr. um dagin. Ein persónur, sum er í sóttarhaldi í tvær vikur (svarandi til 10 arbeiðsdagar) kostar tí landskassanum uml. 9.600 kr.

Útreiðslur til dagpening vegna sjúku í sambandi við COVID-19 hava higartil verið umleið 9 mió. kr. Hetta er í tíðarskeiðinum mars 2020 til um miðjan februar 2021. Helvtin av teimum 9 mió. kr. fullu fyrstu 2-3 mánaðirnar eftir, at COVID-19 kom til Føroya. Síðstu 3-4 mánaðirnar hava útreiðslurnar verið umleið 250 tús. kr. í miðal um mánaðin.

2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Uppskotið hevur ikki við sær umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur.

2.3. Avleiðingar fyri vinnuna
Lógaruppskotið hevur við sær, at afturrindanarskipanin í sambandi við COVID-19 verður galdandi í longri tíð enn við verandi lóggávu, og sostatt hevur uppskotið við sær jaligar avleiðingar fyri privatu vinnuna.

2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið
Lógaruppskotið hevur ikki við sær avleiðingar fyri umhvørvið.

2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum
Lógaruppskotið hevur ikki við sær avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir
Lógaruppskotið hevur jaligar avleiðingar fyri persónar, sum eru fevndir av lógini um dagpening vegna sjúku v.m., fyri persónar í privatu vinnuni, fyri sjálvstøðug vinnurekandi og fyri arbeiðandi fólkapensjonistar, tí skipanin við dagpengum í sambandi við COVID-19 verður longd.

2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum
Lógaruppskotið hevur ikki við sær avleiðingar fyri millumtjóðasáttmálar á økinum.

2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar
Lógaruppskotið hevur ikki við sær avleiðingar fyri tvørgangandi millumtjóðasáttmálar.

2.9. Markaforðingar
Lógaruppskotið hevur ikki við sær kendar markaforðingar.

2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv
Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv.

2.11. Skattir og avgjøld
Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um skattir ella avgjøld.

2.12. Gjøld
Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um gjøld.

2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?
Lógaruppskotið áleggur ikki likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur.

2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?
Lógaruppskotið áleggur ikki heimildir til landsstýrismannin, stovn undir landsstýrismanninum ella til kommunur.

2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?
Lógaruppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn.

2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?
Lógaruppskotið hevur ikki aðrar kendar avleiðingar enn tær, sum eru nevndar omanfyri.

2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum

	Fyri landið ella landsmyndug-leikar	Fyri kommunalar myndugleikar	Fyri pláss ella øki í landinum	Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir	Fyri vinnuna
Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar	Ja	Ja	Nei	Ja	Ja
Umsitingarligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Umhvørvisligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Avleiðingar í mun til altjóða	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei

avtalur og reglur					
Sosialar avleiðingar			Nei	Ja	

Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

Til § 1
Løgtingslógin fer úr gildi tann 1. februar 2022. Tað merkir, at lógin er galdandi til og við 31. januar 2022.

Til § 2
Gildiskoma

Almannamálaráðið, 22. februar 2021

Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur
landsstýrismaður

/ Eyðun Mohr Hansen

Yvirlit yvir fylgiskjøl:
Fylgiskjal 1: Javntekstur